Peugeot 407 Coupé:

# Ein av nýggjheitunum á Genéve Motorshow

**Væntandi verður Peugeot 407 Coupé ein av nýggjheitunum á Genéve Motorshow í mars 2005. Hesaferð er tað ikki italska Pininfarina teknistovan, sum teknar bilin, men designdeildin hjá Peugeot**




*Peugeot 407 Coupé verður ein av nýggjheitunum á Genéve Motorshow í mars 2005*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað verður ikki eins og seinast at italska Pininfarina teknistovan, sum teknaði Peugeot 406 Coupé, teknar avloysaran, 407 Coupé. Hesaferð er tað designdeildin hjá Peugeot, sum teknar bilin.

Forgangarin varð teknaður av Pininfarina miðskeiðis í 90-unum, og designið heldur sær sera væl. Men hesin nýggi er sanniliga eisini smartur og elegantur.

Motorarnir vera t.d.: 3.0 litur V6 og ein 2.7 litur HDi biturbo, sum verður gjørdur í samstarvi millum PSA og Ford.

Peugeot 407 Coupé verður gjørdur í Rennes í Fraklandi saman við Peugeot 407 SW og Citroën C5.

## Porsche mest lønandi



Týska Porsche verksmiðjan er heimsins mest lønandi bilverksmiðja við einum netto yvirskoti upp á góðar 8,0 milliardir krónur. Seinasta roknskaparár vaks sølan við 15 prosentum, har Porsche Cayenne stóð fyri meira enn helminginum av søluni

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ársins bilar í Japan



VW Golf og tann nýggi VW Touran eru kosnir "Ársins Importbilar í Japan 2005"

*Kelda: Motor Magasinet*

## Logan selur væl



Tann lítli bíligi rumenski Dacia Logan fekk góða byrjan í Evropa við 30.000 bíleggingum fyrstu tríggir mánaðirnar, harav 15.000 í Rumenia. Renault eigur Dacia verksmiðjuna

*Kelda: Motor Magasinet*

# Rover 75 V8 sedan og coupé

*Spennandi at vita, um hesum snøggi Rover 75 Coupé verður framleiddur*




**Mótvegis øðrum Rover 75 verður V8 útgávan drivin av bakhjólunum og fæst einans við 4-trins automatgirkassa. Sum nakað nýtt kemur møguliga ein Rover 75 Coupé á marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Rover er eitt 100 ára gamalt bilmerki við langari enskari tradition. Tað bæði sæst og merkist á eitt nú Rover 75, ið er ein sera væl umtóktur bilur. Rover 75 er bæði nútímans og hevur nógv sereyðkenni frá gomlum enskum bilum.

Sum nakað nýtt er nú ætlanin at koma við einum Rover 75 Coupé. Avgerðin um framleiðslu er ikki tikin enn.

Rover 75 fæst við motorum heilt frá 1,8 litur við 150 til 4,6 litur V8 við 250 hk. Í mótsetning til aðrar Rover 75 verður V8 útgávan drivin av bakhjólunum og fæst einans við 4-trins automatgirkassa.




*Rover 75 við 4,6 litur V8 motori og 250 hk. Mótvegis øðrum Rover 75 verður hesin drivin av bakhjólunum*